# Potter stolin

Á midnátt leygarnáttina verður møguligt hjá føroyingum at keypa nýggju bókina um Harry Potter, og hetta er áðrenn amerikanarar hava møguleikan til tað

Tað hava verið sera strangar reglur um, at eingin skal hava møguleika at lesa bókina fyrrenn hon kemur út leygarmorgunin, og bæði bókahandlar og flutningsfyritøkur hava verið noyddar at undirskriva tjúkkar sáttmálar um at halda treytirnar.

Bókin kemur í handilin hjá Rit & Rák á midnátt náttina til leygardagin, og í hesum sambandi hevur Rit & Rák opið í ein tíma – frá midnátt til kl. 01.00. Alt hetta fer fram meðan amerikanararnir pent mugu bíða, til klokkan hevur sligið seinastu sløgini á midnátt har yviri.

Kl. 00.30 fer Bergur Rasmussen at hugleiða um Harry Potter. Bergur hevur týtt tær seinastu bøkurnar, og hevur gjørt sær nakrar tankar um endan av søguni.

Enska bókin ber heitið "Harry Potter and the Deathly Hallows", og longu fyrsta dagin vera væntandi fleiri enn tvær milliónir eintøk seld. Hetta er tvífalt so nógv sum av tí sættu bókini.

Joanna Rowling hevur í einari samrøðu avdúkað, at seinastu tvær bøkurnar eru sum ein samanhangandi long bók í tveimum bindum. Sum vænt vóru nógvar ábendingar í bókini um hvat kann fara at henda í hesi endaligu uppgerðini við Lord Voldemort. Bókin endaði syrgiliga, og innihaldið í hesari verður neyvan sum nakar dansur á rósum. Joanna hevur avdúkað, at enn tveir av høvuðspersónunum fara at lata lív.

Bókin er 608 bls. og kostar 234,- kr.

Annars liggur bókin longu á ymsum heimasíðum, tí tjóvar hava skannað bókina, og lagt hana út á alnótina.




*Soleiðis sær kápan út á nýggju bókini um populera Potter*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og fríggjadagin:**
Fleyr til gul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 18 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, mánadagin møguliga upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 16 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 17 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 21 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 22 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 34 |
| Warzawa | 34 |
| Kiev | 31 |
| Bukarest | 33 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 34 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 11 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1027 hPa. á 48N-30V viknar nakað. Ein hátrýstryggur til Jan Mayen fer spakuliga eystureftir.




**Í dag:**
Hátrýstið í útsynning úr Føroyum verður á Føroyaleiðini teir fyrstu dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/7 kl. 06⁰⁰ – 17/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. $06^{00}$– 2/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum í juli**

- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

**Mikukvøld 18. Juli**
**kl. 19.30**
*MFS skipar fyri kjakkvøld um umstøður teirra lesandi í Føroyum*

## VESTFALLSKYRRINDI

9. juli – Mánin næstur jørðini
14. juli – Tendring
22. juli – Fyrra kvarter; Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. Juli | 10.33 | 22.53 | 09.33 | 21.53 | 09.48 | 22.08 | 00.13 | 12.33 | 01.13 | 13.33 |
| 19. Juli | 11.12 | 23.32 | 10.12 | 22.32 | 10.27 | 22.47 | 00.53 | 13.12 | 01.53 | 14.12 |
| 20. Juli | 11.51 | - | 10.51 | 23.09 | 11.06 | 23.24 | 01.32 | 13.51 | 02.32 | 14.51 |
| 21. Juli | 00.09 | 12.28 | 11.28 | 23.48 | 11.43 | - | 02.09 | 14.28 | 03.09 | 15.28 |
| 22. Juli | 00.48 | 13.22 | - | 12.22 | 00.03 | 12.37 | 02.48 | 15.22 | 03.48 | 16.22 |

| Dagur | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. Juli | 08.48 | 21.08 | 07.48 | 20.08 | 10.48 | 23.08 | 11.48 | - | 10.18 | 22.38 | 11.33 | 23.53 |
| 19. Juli | 09.27 | 21.47 | 08.27 | 20.47 | 11.27 | 23.47 | 00.08 | 12.27 | 10.57 | 23.17 | - | 12.12 |
| 20. Juli | 10.06 | 22.24 | 09.06 | 21.24 | - | 12.06 | 00.47 | 13.06 | 11.36 | 23.54 | 00.32 | 12.51 |
| 21. Juli | 10.43 | 23.03 | 09.43 | 22.03 | 00.24 | 12.43 | 01.24 | 13.43 | - | 12.13 | 01.09 | 13.28 |
| 22. Juli | 11.37 | - | 10.37 | 23.11 | 01.03 | 13.37 | 02.03 | 14.37 | 00.33 | 13.07 | 01.48 | 14.22 |